# Uttanríkis- og mentamálaráðið

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 26. november 2019 |
| Mál nr.: | 16/01740-440 |
| Málsviðgjørt: | OYS/TH |
| Eftirkannað: | 27. november 2019 |

**Løgtingsmál nr. 42/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at byggja skúladepilin í Tórshavn lidnan** (Leingja gildistíðina)

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at byggja skúladepilin í Tórshavn lidnan

(Leingja gildistíðina)

### § 1

Í § 2 í løgtingslóg nr. 67 frá 9. mai 2019 um at byggja skúladepilin í Tórshavn lidnan, verður í § 2 "31. desember 2019" broytt til: "31. desember 2020".

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Landsverk hevur boðað Uttanríkis- og mentamálaráðnum frá, at arbeiðið við at gera skúladepilin lidnan verður ikki liðugt í ár. Tørvur er tí á at leingja gildistíðina á verklagslógini til 31. desember 2020.

Sambært verklagslógini er heimild at brúka 23,9 mió. kr. til at gera skúladepilin lidnan. Tey allar flestu av arbeiðunum, sum skulu gerast, eru liðug og avhandað til Landsverk, men Landsverk má tó staðfesta, at ikki ber til at koma heilt á mál í ár við at fáa alt liðugt.

Orsøkin til, at arbeiðið ikki verður liðugt í ár, er í høvuðsheitum, at prosjekteringin og arbeiðini drógu so mikið langt út, sum tey gjørdu, at ráðgevar og arbeiðstakarar komu í ta støðu, at tey arbeiðir, ið teir skuldu fara til eftir byggingina av skúladeplinum stóðu og vóru byrjað. Starvsfólk vóru tí flutt til nýggjar verkætlanir, og hevur tað síðani verið tíðarkrevjandi at fáa arbeiðstakarar at binda seg til at fáa arbeiðini gjørd liðug. Aðrar avbjóðingar hava eisini stungið seg upp, og eru vaksnar í vavi og tykist ikki møguligt at fáa hesar avgreiddar í inniverandi ári.

Í høvuðsheitum er hetta orsøkin til, at eitt nú sólavskerming av rútunum, samanstoyping av elementum, ventilatión og arbeiðið við jarðhitaskipanini ikki verður liðugt í ár.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi lóggáva er løgtingslóg nr. 67 frá 9. mai 2019 um at byggja skúladepilin í Tórshavn lidnan. Talan er um verklagslóg, ið avloysti løgtingslóg nr. 43 frá 26. mai 2008 um at byggja skúladepil í Tórshavn. Gamla verklagslógin fór úr gildi 31. desember 2018 eftir at tað ikki eydnaðist at samtykkja broyting, ið skuldi leingja gildistíðina til 31. desember 2019.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at leingja gildistíðina á galdandi verklagslóg til 31. desember 2020, so arbeiðið við skúladeplinum kann gerast liðugt í komandi ári.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Gildistíðin fyri galdandi verklagslóg verður longd við einum ári til 31. desember 2020, so arbeiðið við at gera skúladepilin lidnan kann verða gjørt liðugt í komandi ári.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Lógaruppskotið hevur verið til viðmerkingar hjá Fíggjarmálaráðnum og Landsverk. Ongar viðmerkingar vóru til lógaruppskotið.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur ikki beinleiðis fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur, tí talan er bert um at leingja gildistíðina fyri verklagslógina. Sambært verklagslógini kunnu í mesta lagi brúkast 23,9 mió. kr. til at gera skúladepilin lidnan. Hesin peningur er longu játtaður fyri fíggjarárið 2019, og tað, ið eftir er av játtanini, verður flutt til komandi fíggjarár.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Lógaruppskotið hevur tær umsitingarligu avleiðingarnar fyri landið, at landið fær eitt ár afturat at gera skúladepilin í Tórshavn lidnan.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Uppskotið ávirkar ikki og verður ikki ávirkað av millumtjóðasáttmálum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Uppskotið ávirkar ikki og verður ikki ávirkað av hesum sáttmálum:

1) **Hoyvíkssáttmálin**

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**

### 2.9. Markaforðingar

Uppskotið hevur ikki við sær markaforðingar, og ongar markaforðingar eru, ið ávirka uppskotið.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið viðvíkur hvørki revsing, útpanting ella øðrum størri inntrivum.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Lógaruppskotið viðvíkur hvørki skattum ella avgjøldum.

**2.12. Gjøld**
Lógaruppskotið viðvíkur ikki gjøldum.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Nei

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Nei

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Nei

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Nei

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1**
Ásett verður, at gildistíðin verður longd við einum ári.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Uttanríkis- og mentamálaráðið, 4. desember 2019

**Jenis av Rana**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Fíggjarmálaráðnum
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Landsverk